*Útbúgva seg hjá BP í Bretlandi:*

# Føroyingar vóna olja fer at geva framburð

JAN MULLER

Rói Strøm, Jákup Øregaard og Kim Hansen eita teir. Hesir tríggir føroyingarnir verða umrøddir og avmyndaðir í seinastu útgávuni av blaðnum hjá stóra oljufelagnum BP, „BP Exploration Europa Today“.

Undir yvirskriftini „Føroyingar vóna, at olja fer at hava framburð við sær“ verður greitt frá gongdini í Føroyum, har trupulleikar hava tikið seg upp innan fiskivinnuna, og har vónirnar til eina komandi oljuvinnu ti koma væl við.

Í greinini verður greitt frá teimum trimum føroyingunum, sum eru á einum seks mánaðar skeiði hjá BP. Rói Strøm hevur arbeitt á oljupallum áður, meðan hini báðir, Jákup Øregaard og Kim Hansen eru útbúnir sivilverkfrøðingar og royna seg sum so fyri fyrstu ferð í hesi nýggju vinnu. Jákup og Kim hava verið knýttir at pallunum Andrew og Harding, fyrst úr landi men skulu í næstum umborð á pallarnar at arbeiða.

Um somu tíð sum arbeitt verður hjá BP lesa teir á lærda háskúlanum í Aberdeen um kvøldarnar. Har er ætlanin at fáa ein „MSc in Technology and Management in the oil and gas industry“.

Rói Strøm, sum hevur arbeitt hjá eitt nú Mærsk Drilling, sigur við „BP Today“, at føroyingar vóna at finna olju og harvið hjálpa búskapinum og at verða við til at útvega nýggj arbeiði.

Hann er sera fegin um møguleikan at vera í arbeiði hjá BP í eina tíð: –Hetta er ein framúr góður møguleiki fyri okkum at læra um oljuvinnuna, og er olja her, so eru vit fyrireikaðir.

Í greinini verður greitt frá arbeiðinum hjá BP í føroyskum øki og víst verður á, at BP og Shell saman fara at bjóða uppá blokkar í føroyskum øki innan 5. desember. Hetta er fyri bils royndarumfarið, sum føroyskir oljumyndugleikar hava tikið stig til.

**BP virkið við Føroyar**

Í samrøðu við leitingarstjóran hjá BP fyri Atlantsmótið, Tom Fife verður annars greitt frá kanningunum hjá BP á føroyskum øki. BP er eitt av teimum mest virknu oljufeløgunum á føroyskum øki. Felagið var við í Lopra, tað hevur gjørt rættiliga umfevnandi seismiskar kanningar frá verandi oljukeldununum á Foinaven leiðini vestan fyri Hetland og vestur eftir móti Lopra.

BP er so eisini við til at liggja tær umhvørviskanningar, sum verða gjørdar á føroyskum øki.

Tom Fife sigur við blaðið, at tá tað kemur so langt sum til fyrstu veruliga lisensrunduna við Føroyar verða BP og Shell at bjóða saman.



Faroese hope that oil will bring prosperity

GRIZZLY REAPS CHAIRMAN'S PRAISE

*Greinin um teir tríggjar føroyingarnar*



*Føroysk framtíð. Rói Strøm, Jákup Øregaard og Kim Hansen hyggja at einum modelli av útbúnaði, sum verður sett upp á havbotninum*

# Skúlastjórastarv í Runavíkar Skúla

Starvið sum skúlastjóri í Runavíkar Skúla verður hervið lýst leyst til setanar frá 1. august 1997.

Í skúlanum eru nú 367 næmingar í 10 árgangum. 35 lærarar starvast í skúlanum.

**Søkt verður eftir skúlastjóra, sum**

- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av virksemi skúlans
- skal sýna leiðslumyndugleika og -hegni
- er góður at samstarva við og fyrikomandi
- er kveikjandi í sínum skúlahugsanum
- á fólkaræðisligum støði skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum næmingar, lærarar og onnur samstarvsfólk
- er førur fyri skilja støðuna hjá øðrum.

**Harumframt skal skúlastjórin**

- hava hug og hegni til at átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- leggja dent á at fremja andsfrælsi, tolsemi og gott samarbeiði millum heim og skúla
- vera førur fyri at loysa møguligar trupulleikar
- vera førur fyri at menna starvsfólkaleiðsluna
- skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd
- leggja dent á menning av skúlaskapinum í kommununi
- eggja næmingum, foreldrum og lærarum til at leggja doyin á at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

Tann, ið sett/-ur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið, sum er tænastumannastarv sambært lóg nr. 65 frá 8. mars 1972, verður lønt í 33. lønarflokki, sambært semju millum Føroya Landsstýri og Føroya Lærarafelag, dagfest 29. mai 1996.

Tað skylduga undirvísingartimatalið verður ásett eftir galdandi reglum um tænastutíðina hjá tænastumonnum í fólkaskúlanum.

Umsókn, sum verður skrivað á oyðublað, ið fæst frá Landsskúlafyrisitingini, skal verða stílað til Føroya Landsstýri og send ***Landsskúlafyrisitingini, Falkavegi 6, postrúm 3279, 110 Tórshavn,*** so at hon er Landsskúlafyrisitingini í hendi í **seinasta lagi mikudagin 29. januar 1997 kl. 16.00.** Við umsóknini eiga at verða løgd ljóstøk av próvbrævi og møgulig viðmæli.

*Tórshavn, 3. januar 1997*

**LANDSSKÚLAFYRISITINGIN**

**Gasskomfýrar á goymslu**




**Føroya Gasssøla**

Akranesgøta 2 · Tórshavn (við Vebastaðvegin) · Tlf. 15544